# Veltir við sølu fyri eyga

**Esmar Sørensen á Viðareiði fer í ár at seta eitt ella tvey tons av eplum niður, og gongur væl, fer hann at velta væl meira komandi árini**

Randi Jacobsen

Tey flestu, sum velta eplir, seta bara niður til seg og síni.

Men nøkur velta meira, og um heystið plaga føroysk eplir at vera til keyps í nøkrum handlum.

Esmar Sørensen á Viðareiði miðar eftir at kunna liva av landbúnaði. Tey hava ein fýra marka garð og umleið 150 seyðir. Ti kann eingin liva av.

– Vit flyta stórar nøgdir av eplum inn, og tað skuldi ikki verið neyðugt, heldur Esmar Sørensen.

Hann er við at fáa sær útgerð til at pløga og saksa við, og ætlan hansara er í ár at seta eitt tons ella kanska tvey av eplum niður í ár. Enn er hann á byrjanarstøði.

## Upplæring

– Eg má læra meg fyrst at brúka maskinurnar, áðrenn eg fari at seta meira niður. Eg havi eisini tosað við Jóannes í Miðstovuni á Sandi, og hann vil gjarna læra frá sær, sigur Esmar Sørensen.

Tá ið hann er komin á lagið, ætlar hann at seta fleiri tons niður. Røtur ætlar hann sær eisini at hava nógvar.

Esmar Sørensen hevur velt eplir, líka síðan hann var smádrongur, og hann hevur altíð hildið tað verið áhugavert at fylgt við, hvussu veksur.

Tað er uppi við Garð á Viðareiði, at hann ætlar at hava sína stóru veltu. Har er góður sólargangur. Sólin stendur á allan dagin.

Hann vil heldur hava hyppiveltu enn flagveltu, tí tað ber ikki til at hava flagveltu í somu teigum í fleiri ár á rað. Øðrvísi er við hyppiveltuni, tí tað er bara at saksa hvørt vár.

Esmar Sørensen fer í ár at royna eini fimm eplasløg.




LANDSHANDILIN

# SETEPLI

| | UPPRUNI | NØGD | ÚTSJÓND | LITUR | SKAL |
|---|---|---|---|---|---|
| **FOLVA** | Danskt | 25 kg | Avlangt | Hvítt | Hvítt |
| | *Goymist væl, smakkar væl. javnt gott, stórt. Trygga valið.* | | | | |
| **HANNA** | Danskt | 25 kg | Avlangt | Gult/hvítt | Hvítt |
| | *Veksur skjótt, stórt, smakkar og goymist væl.* | | | | |
| **MARIS PIPER** | Skotskt | 25 kg | Runt | Hvítt | Hvítt |
| | *Goymist væl, smakkar sera væl.* | | | | |
| **RAJA** | Danskt | 25 kg | Avlangt | Gult/hvítt | Reytt |
| | *97% mótstøðuført móti svartspillu. Smakkar væl.* | | | | |

**HANDILSTØÐ**
Til veltu & urtagarð
MPK-14-3-18
v/ 10% kálk, 25 kg.

**NATTÚRUTØÐ**
Turkað nattúrutøð
12-3-8, 25 kg.

**KÁLK**
Grannulerað kálk
25 kg.

**SPAGNUM**
Spagnum mold
100 ltr.

LANDSHANDILIN

www.landshandilin.fo
Akranesgøta 11 · Tórshavn · tlf 311385



Sosialurin

**Í Miðlahúsinum mikukvøldið 4. mai 2011 kl 19.30**

# Kunningarfundur hjá Fróðskaparsetri Føroya

Fróðskaparsetrið hevur kunningarfund í Miðlahúsunum í Vágsbotni í Havn mikukvøldið 4. mai 2011 kl. 19.30

**Skráin verður hendan**

**kl. 19.30** Jóan Pauli Joensen, rektari bjóðar vælkomin
**kl. 19.40** Føroya Læraraskúli hevur orðið
**kl. 20.00** Náttúruvísindadeildin hevur orðið
**kl. 20.20** Føroyamálsdeildin hevur orðið
**kl. 20.40** Guðrið Hansdóttir syngur og spælur
**kl. 20.50** Sjúkrarøktarfrøðiskúli Føroyahevur orðið
**kl. 21.10** Søgu- og samfelagsdeildin hevur orðið
**kl. 21.30** Guðrið Hansdóttir syngur og spælur
**kl. 21.40** Tikið verður samanum

